Skúlastýrisfundur 3. mars kl. 18:30

Skrá:

1. Ferðsluviðurskiftini við Vágs Skúla
2. Framløgan fyri VK um virksemi skúlans  tankar hesum viðvíkjandi......
3. Fíggjarjáttan fyri 2021
4. Ymiskt

Møtt vóru Durita, Rakul, Birgir, Levi, Hjørdis og John Henrik

Ad. 1

Skúlastýrið hevur fingið myndir av ætlanunum at bøta um ferðsluviðurskiftini við skúlan. Hetta eru ætlanir frá 2019. Nývalda býráð hevur, smb. leiðarinum á teknisku deild, ætlanir um at takað málið um ferðsluviðurskiftini við skúlan upp aftur á ferðslunevndarfundið tann 03. Mai 2021

Skúlastýrið fylgir gongdini og metur at hetta málið eigur at hava høga raðfesting




Ad. 2

Skúlastjórin er boðin at halda eina framløgu um virksemi skúlans fyri nývalda býráð tann 2. Mars.

Skúlastjórin legði fram tankar sínar um virksemi skúlans og eitt tjak var um framløguna.

Høvuðs tátturin í framløguni er at skúlin vil hava næmingin í miðdepilin. At vit gera alt vit kunnu fyri at menna einkulta næmingin, fyri ein so fjølbroyttum skúlatilboðið sum tilber.

Tosað var um at skipa innskúlingina ørvísi komandi skúlaár. Ætlanin er at fáa eina meira kreativa innskúling og um møguligt skipa fyri einari meira líðandi yvirgongd frá barnagarð til skúlan.

Dømi um eina ørvísi tímatalvu var løgd fram og tjakast var um hana

| 1. flokkur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Onsdag | Tórsdag | Fríggjadag |
| 1. tími kl. 08.00 | Lesing | Rokning | Verkstaður | Rokning | Rokning |
| 2. tími kl. 08.55 | Skriving | Lesing | Verkstaður | Lesing | Lesing |
| 3. tími kl. 10.00 | Rørsla | Skriving | Verkstaður | Rørsla | Skriving |
| 4. tími kl. 10.45 | Sjónleikur | Svimjing | List/tónleikur | Heimst. | Matgerð/floksins tími |
| 5. tími kl. 11.50 | Rokning | Svimjing | List/tónleikur | | Matgerð/floksins tími |
| 6. tími kl. 12.45 | | | | | |
| 7. tími kl. 13.30 | | | | | |

| 2. flokkur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Onsdag | Tórsdag | Fríggjadag |
| 1. tími kl. 08.00 | Lesing | Lesing | Verkstaður | Lesing | Lesing |
| 2. tími kl. 08.55 | Rokning | Rokning | Verkstaður | Rokning | Kristni |
| 3. tími kl. 10.00 | Rørsla | Rørsla | Verkstaður | Rørsla | Rokning |
| 4. tími kl. 10.45 | Sjónleikur | Heimst. | Svimjing | Kristni | Matgerð/floksins tími |
| 5. tími kl. 11.50 | Kristni | Heimst. | Svimjing | Sjónleikur | Matgerð/floksins tími |
| 6. tími kl. 12.45 | | | | | |
| 7. tími kl. 13.30 | | | | | |

| 3. flokkur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Onsdag | Tórsdag | Fríggjadag |
| 1. tími kl. 08.00 | Lesing | Lesing | Verkstaður | Lesing | Kristni |
| 2. tími kl. 08.55 | Skriving | Skriving | Verkstaður | Rokning | Rokning |
| 3. tími kl. 10.00 | Rørsla | Rørsla | Verkstaður | Rørsla | Lesing |
| 4. tími kl. 10.45 | Sjónleikur | Rokning | Svimjing | Danskt | Matgerð/floksins tími |
| 5. tími kl. 11.50 | Kristni | list/tónl. | Svimjing | Danskt | Matgerð/floksins tími |
| 6. tími kl. 12.45 | Heimst. | list/tónl. | | Heimst. | |
| 7. tími kl. 13.30 | | | | | |

Vit nomu eisini við hølisavbjóðingar skúlans. Skúlastjórin helt at um ætlaninar við gl. Svimjihyli blivu framdar, vildi tað loysa ein stóran part at hølistrupuleikanum í skúlanum. Levi førdi fram, at ætlanin var at brúka núverandi kommunuskrivstovu til innskúling / forskúla.

Ad. 3

Fíggjarætlanin fyri 2021 var framløgd. Tosað var um fíggjarætlanina og skúlastýrið seti nakrar spurningar um ymiskir postar á fíggjarætlanina.

Birgir førdi fram at túnið í skúlagarðinum er illa farið og hetta átti mann at raðfesta at fáa afturgjørt.

Ad. 4

Undir ymiskt var felags foreldrafundur umrøddur. Nú almennu tilmælini viðv. Korona enn eru galdandi, var avgjørt at hava felags foreldrafund síðst í sept. 2021. Skúlastýrið umrøddi fleiri møguligar fyrilestrahaldarar til hendan foreldrafundin.

D. Poulsen
Durita Poulsen

R. Brattaberg
Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Levi Mørk

Jónleyg Eyðunsson

Hjørdis R. Simonsen
Hjørdis Ryggshamar